# VILT TÚ FLYTA TEG?

Nordplus Rammuskráin hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum flytur teg til lærdóm, íblástur og upplivingar í Norður- og Baltalondum. Rammuskráin er ein útbúgvingarskipan, sum veitir góðan fíggjarligan stuðul til:
• Mobilitet
• Verkætlanir
• Netverk

Skipanin vendir sær til allar útbúgvingarstovnar, felagsskapir og onnur, sum eru áhugað í útbúgving, lívslangari læring og persónligari menning.

Tilmelding til Nordplus Rammuskránna skal gerast á www.nordplusonline.org
Seinasta freist at melda seg til er mánadagin 2. mars 2009.

Meira kunning fæst á www.ciriusonline.dk
Á Altjóða Skrivstovuni www.ask.fo
Tlf. 322 065, ask@ask.fo
Tlf. 592 065, eh@ask.fo





NORDPLUS

Altjóða Skrivstovan
www.ask.fo


## Tjekklisti frá ASK:

# »Áðrenn tú fert uttanlands at lesa«

- Hugsa um hví tú vilt lesa uttanlands
- Byrja í góðari tíð at umráða teg og at fyrireika – eitt ár frammanundan
- Hugsa um hvat tú væntar tær av lestrinum
- Finn landið ella londini tú kundi hugsað tær at lisið í
- Ger av um tú vilt taka alla útbúgvingina ella bert ein part av henni uttanlands
- Ger av um tú vilt ferðast sjálvstøðugt ella gjøgnum onkra umskiftisskipan
- Fá tær nágreiniligar upplýsingar um tey universitet og tær útbúgvingar, tú hugsar um
- Ber saman innihald, upptøkukrøv, umsóknarfreistir og prísir
- Søk um SU góðkenning av útbúgvingini, so tú veist, um tú fært stuðul
- Hvussu við fígging? Ger eina fíggjarætlan yvir fyrsta árið
- Kanna, um útbúgvingin kann brúkast, har tú ætlar at brúka hana
- Søk í góðari tíð, áðrenn umsóknarfreistin er úti. Tryggja tær, at alt er fylt rætt út
- Kanna um málroynd er kravd. Søk um undantaksloyvi ella tak royndina, um tað krevst
- Kanna bústaðarviðurskiftini og søk so tíðliga sum gjørligt
- Søk um visum um tað er neyðugt
- Kanna tryggingar- og skattaviðurskifti